Almannamálaráðið

Løgtingið

Dagfesting: 27. oktober 2020
Mál nr.: 20/00545
Málsviðgjørt: EM
Eftirkannað: 9. september 2020

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd (Barnaverndarlógin)
(Javning av upphæddum og ferðaútreiðslur í sambandi við samveru)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd (Barnaverndarlógin)
(Javning av upphæddum og ferðaútreiðslur í sambandi við samveru)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd (Barnaverndarlógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 134 frá 9. desember 2005, løgtingslóg nr. 39 frá 8. mai 2007, løgtingslóg nr. 50 frá 8. mai 2007, løgtingslóg nr. 52 frá 8. mai 2012, løgtingslóg nr. 104 frá 24. oktober 2012, løgtingslóg nr. 139 frá 18. desember 2013, løgtingslóg nr. 93 frá 6. juni 2017, løgtingslóg nr. 69 frá 25. mai 2020 og § 60 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 22 verður sum stk. 8 sett:
"*Stk. 8.* Barnaverndartænastan ber ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru, um foreldrini ikki sjálvi megna at halda hesar útreiðslur."

2. Í § 29 verður sum stk. 5 sett:
"*Stk. 5.* Samsýningar og veitingar sambært hesi grein verða árliga javnaðar sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Løgtingsins umboðsmaður hevur fyrr í ár viðgjørt eina klagu um vantandi endurgjald av ferðaútreiðslum, sum foreldur hevði havt í sambandi við samveru við børn síni, sum vóru umsorganaryvirtikin. Talan er um sokallaðar koyripengar. Undir viðgerðini av klaguni varð komið eftir, at heimildin hjá barnaverndartænastunum at gjalda fyri slíkar ferðaútreiðslur í sambandi við samveru eftir barnaverndarlógini er ivasom ella ógreið.

Umboðsmaðurin hevur tí heitt á Almannamálaráðið um at fáa til vegar greiða heimild til barnaverndartænasturnar at gjalda foreldrum fyri ferðaútreiðslur í sambandi við samveru eftir barnaverndarlógini.

Í 2017 var Løgtingsins umboðsmaður á eftirlitsvitjan á deildum í Trivnaðareind 10 hjá Almannaverkinum (Barnaheimið). Í frágreiðing síni frá hesum eftirlitsvitjanum, sum kom í 2019, kom umboðsmaðurin við fleiri viðmerkingum og tilmælum til ávís viðurskifti á stovnunum. Millum annað mælti umboðsmaðurin til, at greiða fæst á, hvørjar útreiðslur lummapeningurin hjá børnunum skal fevna um, so staðfestast kann, um upphæddirnar eru nøktandi.

Í hesum sambandi er komið eftir, at tað er ógreitt, hvussu upphæddirnar á lummapeningi, og aðrar upphæddir sambært lógini, sum eru nærri ásettar í kunngerð nr. 69 frá 19. mai 2006 um samsýning til fosturforeldur, sum broytt við kunngerð nr. 159 frá 13. desember 2018, verða javnaðar.

1.2. Galdandi lóggáva

Sambært § 22, stk. 1 í barnaverndarlógini hava børn og foreldur samverurætt í tann mun, samverurætturin ikki er skerdur sambært foreldramyndugleikalógini.

Ongar nærri ásetingar eru um ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru eftir barnaverndarlógini, hvørki í § 22 ella í viðmerkingunum til greinina.

Í leiðbeining nr. 8000 frá 19. februar 2020 frá Almannamálaráðnum um samverurætt og duldan bústað, sbrt. § 22 í barnaverndarlógini, er í pkt. 3.3. ásett, at útreiðlsur í sambandi við samveru eftir barnaverndarlógini, t.e. ferðaútreiðslur o.l., heldur barnaverndartænastan, um foreldrini ikki sjálvi megna at halda hesar útreiðslur.

Av tí at ongar ásetingar eru um ferðaútreiðslur í sambandi við samveru í lógini, er heimildin hjá barnaverndartænastunum at gjalda fyri slíkar ferðaútreiðslur ivasom.

Viðvíkjandi lummapeningi til børn, sum eru sett heiman, er í barnaverndarlógini ásett, at landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um samsýning til fosturforeldur, gjald fyri uppihald og aðrar útreiðslur viðvíkjandi barninum, undir hesum lummapening til børn, sum eru sett heiman.

Sambært løgtingslóg nr. 64 frá 30. apríl 2018 um javningarprosent til almannaveitingar verður fyri hvørt ár roknað eitt javningarprosent, sum verður nýtt til at javna ymiskar upphæddir í almannalóggávuni. Upphæddirnar verða fyrstu ferð javnaðar 1. januar 2021.

Barnaverndarlógin, og harvið upphæddirnar, sum eru ásettar í kunngerð um samsýningar til fosturforeldur, er ikki nevnd í hesum sambandi.

Tí er ógreitt, hvør heimildin er fyri at javna upphæddirnar á lummapeningi.

Higartil eru javnaðu upphæddirnar á lummapeningi árliga ásettar í kunngerð nr. 139 frá 27. november 2019 um áseting og javning av almannaveitingum.

Víst verður eisini á løgtingsmál nr. 34/2020, har ætlanin er at útseta javningina av almannaveitingum 1. januar 2022.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at fáa til vegar greiða heimild til barnaverndartænasturnar at gjalda ferðaútreiðslur í sambandi við samveru eftir barnaverndarlógini.

Útgjald av almennum peningi eigur at hava greiða heimild. Neyðugt er tí við greiðari heimild til barnaverndartænasturnar at gjalda foreldrum fyri ferðaútreiðslur í sambandi við samveru. Heimildin fæst til vegar við at broyta barnavernadarlógina, har ásett verður, at barnaverndartænastan ber ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru, um foreldrini ikki sjálvi megna at halda hesar útreiðslur.

Í leiðbeining nr. 8000 frá 19. februar 2020 frá Almannmálaráðnum um samverurætt og duldan bústað, sbrt. § 22 í barnaverndarlógini er lagt upp til, at barnaverndartænasturnar skulu gera eina ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri, um barnaverndartænasturnar skulu gjalda fyri ferðaútreiðslur, sum foreldur hava í sambandi við samveru eftir barnaverndarlógini.

Samveran millum foreldur og børn, sum eru umsorganaryvirtikin, skal tryggjast. Um fíggjarligar forðingar eru, eigur barnaverndartænastan at gera eina heildarmeting av tørvinum hjá foreldrunum at fáa goldið fyri ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveruna. Tað vanliga er, at ferðaútreiðslurnar verða útgoldnar eftir takstunum hjá Strandfaraskipum Landsins, men í summum førum er neyðugt at gjalda fyri útreiðslur, sum foreldrini hava av at koyra í egnum bili. Hetta er til dømis galdandi, tá foreldur ella fosturfamiljur búgva óhøgliga fyri í mun til almennan flutning. Í hesum førum verður endurgjald veitt sambært galdandi reglum um koyripening.

Eingin onnur vegleiðing er um útgjald av ferðaútreiðslum í sambandi við samveru. Ætlanin er tí, at tað í leiðbeining nr. 8000 frá 19. februar 2020 verður nágreinað, hvussu barnaverndartænasturnar skulu gera eina tørvsmeting, og hvørjar fortreytir skulu vera galdandi fyri útgjaldi av ferðaútreiðslunum í sambandi við samveru eftir barnaverndarlógini.

Endamálið við uppskotinum er eisini at fáa til vegar heimild at javna veitingar við heimild í barnaverndarlógini sambært løgtingslóg nr. 64 frá 30. apríl 2018 um javningarprosent til almannaveitingar.

Neyðugt er við greiðari heimild til at javna upphæddirnar, sum eru ásettar í kunngerð nr. 69 frá 19. mai 2006 um samsýning til forsturforeldur. Heimildin fæst við at broyta barnaverndarlógina, har ásett verður, at upphæddir sambært lógini verða árliga javnaðar sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar.

Ætlanin er eisini at broyta kunngerð nr. 69 frá 19. mai 2006 um samsýning til fosturforeldur, soleiðis at ásett verður, at landsstýrismaðurin á hvørjum ári kunngerð javnaðu upphæddirnar í rundskrivi, har aðrar upphæddir innan sama øki eisini kunnu verða kunngjørdar, undir hesum barnagjald og hjúnafelagagjald.

Sum avleiðing av hesum verður eisini neyðugt at broyta kunngerð nr. 139 frá 27. november 2019 um áseting og javning av almannaveitingum, soleiðis at § 7 um upphæddir sbrt. kunngerð um samsýning til fosturforeldur verður strikað.

Støða sæst ongantíð vera tikin til, hvørjar útreiðslur, lummapeningurin skal fevna um. Tað er sostatt ógreitt, hvørjar útreiðslur skulu rindast av lummapeninginum hjá børnunum, og hvørjar útreiðslur landið ella kommunurnar skulu rinda. Ógreitt er eisini, um upphæddirnar á lummapeningi eru nóg stórar.

Fyri 2020 eru upphæddirnar 24 kr. um vikuna til børn 3-10 ár, 56 kr. um vikuna til børn 11-13 ár, 114 kr. um vikuna til børn 14-15 ár og 227 kr. um vikuna til børn eldri enn 16 ár.

Ætlanin er at orða leiðreglur fyri, hvørjar útreiðslur lummapeningurin skal fevna um, soleiðis at til ber at meta um, um upphæddirnar eru nøktandi. Kann tað staðfestast, at upphæddirnar ikki eru nøktandi, verður kunngerðin um samsýning til fosturforeldur, ið áseta upphæddina til lummapening, broytt samsvarandi.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við uppskotinum fæst til vegar greið heimild til barnaverndartænasturnar at gjalda foreldrum fyri ferðaútreiðslur í sambandi við samveru eftir barnaverndarlógini.

Við uppskotinum fæst eisini til vegar greið heimild at javna veitingar við heimild í barnaverndarlógini sambært løgtingslóg nr. 64 frá 30. apríl 2018 um javningarprosent til almannaveitingar.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið er sent til ummælis hjá Barnaverndarstovuni, Fosturforeldrafelagnum, Kommunufelag Føroya, Almannaverkinum, Føroya Kærustovni og Fíggjarmálaráðnum.

Tá ið hoyringarfreistin var úti, vóru viðmerkingar komnar frá Fíggjarmálaráðnum, Fosturforeldrafelagnum og Barnaverndarstovu Føroya.

Sambært uppskotinum verður nýtt stk. 5 sett í § 29, sum er soljóðandi: "Veitingar sambært lógini verða árliga javnaðar sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar."

Fíggjarmálaráðið vísir á, at tað ikki er nágreinað, hvørjar veitingar skulu javnast sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar. Tað er neyvan ætlanin, at høvuðsbarnaverndarnevndarsamsýningin, nevnd í § 12, stk. 5, skal javnast sum almannaveitingarnar. Er tað púra greitt, at ein samsýning er ikki ein veiting, er tó eingin trupulleiki.

Fíggjarmálaráðið skjýtur tí upp, at orðingin verður soljóðandi: "Veitingar sambært § 29 verða árliga javnaðar sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar."

Hetta verður tikið til eftirtektar.

Fosturforeldrafelagið vísir m.a. á, at lummapeningur eigur at verða skattafríur, og at upphæddin á lummapeningi ikki er hækkað í fleiri ár.

Somuleiðis verður víst á, at lummapeningur verður javnaður, meðan aðrar samsýningar til fosturforeldur og veitingar annars ikki verða javnaðar sambært kunngerðini.

Tó at hetta ikki er ásett í § 29 í skattalógini sæst í skrivliga tilfarinum, ið liggur til grund fyri kunngerðini, at hvørki gjald til vistarhald og klæði og lummapeningur eru skattskyldug mótsett samsýningini til fosturforeldur. Almannamálaráðið hevur boðað Fíggjarmálaráðnum frá hesum við áheitan um at broyta skattalógina samsvarandi.

Ætlanin er at hækka upphæddirnar á lummapeningi. Hetta verður gjørt í kunngerð um samsýning til fosturforeldur. Í somu kunngerð verður í § 2, stk. 2 ásett, at landsstýrismaðurin kunnger javnaðu gjøldini í rundskrivi í seinasta lagi 31. desember á hvørjum ári til at koma í gildi 1. januar árið eftir. Tað eru sostatt bæði lummapeningur, samsýningar til fosturforeldur og veitingar annars, sum verða javnað.

Barnaverndartænasturnar meta, at tað er ov krevjandi umsitingarliga at gera eina tørvsmeting av fíggjarstøðuni hjá foreldrunum fyri at meta um, hvørt tey megna at bera útreiðslurnar sjálvi. Slík meting kann eisini verða orsøk til tvístøður og til vansa fyri samstarvið við foreldrini. Mælt verður tí til, at ásett verður, at endurgoldið verður eftir takstunum hjá Strandfaraskipum Landsins. Har tað ikki er møguligt at nýta almenna ferðslu kann endurgjaldast eftir takstunum hjá Fíggjarmálaráðnum fyri ferðing í egnum bili.

Undir pkt. 1.3. í almennu viðmerkingunum er ásett, at tað er vanligt at nýta takstirnar hjá Strandfaraskipum Landsins. Í teimum førum, har foreldur búgva óhøgliga fyri í mun til almennan flutning, verður endurgjald veitt sambært galdandi reglum um koyripening.

Løgtingsins umboðsmaður hevur í sambandi við eina klagu um vantandi endurgjald fyri ferðaútreiðslur víst á, at tað er óheppið, at summar barnaverndartænastur gera eina tørvsmeting, tá tær gjalda fyri ferðaútreiðslur í sambandi við samveru, meðan aðrar barnaverndartænastur ikki gera hetta. Umboðsmaðurin hevur somuleiðis víst á, at tað ikki er nøktandi, at eingin vegleiðing er um, hvussu tørvsmetingin skal gerast, og hvørjar fortreytir skulu vera galdandi í sambandi við útgjald av ferðaútreiðslum.

Umboðsmaðurin hevur tí heitt á Almannamálaráðið um at nágreina, hvussu barnaverndartænasturnar skulu gera eina tørvsmeting, og hvørjar fortreytir skulu vera galdandi viðvíkjandi útgjaldi av ferðaútreiðslum í sambandi við samveru. Hetta fyri at tryggja, at foreldur at umsorganaryvirtiknum børnum verða viðgjørd eftir somu fyritreytum, tá ferðaútreiðslur í sambandi við samveru verða útgoldnar, uttan mun til hvar í landinum tey búgva.

Hildið verður tí fast um, at barnaverndartænasturnar gera eina tørvsmeting, tá goldið verður fyri ferðaútreiðslur í sambandi við samveru. Hvørjar fortreytir verða galdandi, verður nágreinað í leiðbeining nr. 8000 frá 19. februar 2020 frá Almannamálaráðnum um samverurætt og duldan bústað.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið um at gera broytingar í løgtingslóg um barnavernd hevur í sær sjálvum ikki fíggjarligar avleiðingar, av tí at talan einans er um útvegan av greiðum heimildum til verandi mannagongdir.

Barnaverndartænasturnar gjalda longu sum er foreldrum fyri ferðaútreiðslur í sambandi við samveru, um tey ikki sjálvi megna at halda hesar útreiðlsur.

At veitingarnar verða javnaðar og harvið hækka, økir um almennu útreiðslurnar. Av tí at upphæddirnar sambært lógini longu sum er verða javnaðar sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar verður mett, at uppskotið ikki hevur fíggjarligar avleiðingar.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri barnaverndartænasturnar, sum skulu gera eina ítøkiliga heildarmeting av tørvinum hjá foreldrunum at fáa goldið fyri ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveruna.

Uppskotið hevur eisini umsitingarligar avleiðingar fyri Almannamálaráðið, sum hvørt ár skal javna veitingarnar við javningarprosentinum.

Talan verður tó ikki um umsitingarligan meirkostnað.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur fíggjarligar og sosialar avleiðingar fyri tey, sum móttaka veitingar sambært barnaverndarlógini. Uppskotið tryggjar, at hesi frameftir fara at hava størri vissu fyri, hvussu teirra inntøkugrundarlag broytist frameftir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Ja	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Ja	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

Nr. 1.
Við hesi grein verður heimildin hjá barnaverndartænastum at gjalda ferðaútreiðslur til foreldur í sambandi við samveru eftir barnaverndarlógini ásett. Barnaverndartænasturnar bera ferðaútreiðslurnar, um foreldrini ikki sjálvi megna at halda hesar útreiðslur.

Um fíggjarligar forðingar eru, eigur barnaverndartænastan at gera eina heildarmeting av tørvinum hjá foreldrunum at fáa goldið fyri ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveruna. Tað vanliga er, at ferðaútreiðslurnar verða útgoldnar eftir takstunum hjá Strandfaraskipum Landsins, men í summum førum er neyðugt at gjalda fyri útreiðslur, sum foreldrini hava av at koyra í egnum bili. Hetta er til dømis galdandi, tá foreldur ella fosturfamiljur búgva óhøgliga fyri í mun til almennan flutning. Í hesum førum verður endurgjald veitt sambært galdandi reglum um koyripening.

Í leiðbeining nr. 8000 frá 19. februar 2020 frá Almannamálaráðnum um samverurætt og duldan bústað, sbrt. § 22 í barnaverndarlógini, verður nærri nágreinað, hvussu barnaverndartænasturnar skulu gera eina tørvsmeting, og hvørjar fortreytir skulu vera galdandi fyri útgjaldi av ferðaútreiðslunum í sambandi við samveru eftir barnaverndarlógini.

Nr. 2.
Við hesi grein verður ásett, at veitingar sambært § 29 í lógini verða árliga javnaðar sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Almannamálaráðið, 27. oktober 2020

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Ummælisskriv frá Almannaverkinum
Fylgiskjal 2: Ummælisskriv frá Fíggjarmálaráðnum
Fylgiskjal 3: Ummælisskriv frá Fosturforeldrafelagnum
Fylgiskjal 4: Ummælisskriv frá Barnaverndarstovu Føroya